


Á Skála og Strondum eru tilsamans 15 mans, og 15 mans eru eisini á Toftum og í Runavíkarøkinum. Seks eru í Oyndarfirði, fimm í Funningsfirði og Elduvík – og tríggir mans eru í Funningi.

- Samanhaldið millum sløkkiliðsmenninar í økinum hevur verið ógvuliga gott, og vit hava eisini gjørt eitt sindur meiri burturúr hesi seinnu árini, sigur Sunleiv, sum hevur verið sløkkiliðsleiðari hjá Skálafjarðar Sløkkiliði í eini 10 ár – og í fulltíðarstarvi síðan ár 2007.

Hann vísir á, at allir sløkkiliðsmenninir hjá Skálafjarðar Sløkkiliði eisini hava fingið búnar, sum menninir kunnu nýta, tá teir umboða sløkkiliðið.

- Vit hava ymiskar uppgávur, og ein av hesum er, tá altjóða fótbóltsdystir verða leiktir í økinum. Bæði FIFA og EUFA hava krøv um, at sløkkiliðsfólk eru partur av trygdarmanningini, og tí hava vit altíð eitt lið við, tá slíkir dystir verða leiktir.

Sunleiv sigur, at sløkkiliðsfólk eisini hava aðrar umboðandi uppgávur, og menn hava saknað ein felagsbúnað í slíkum føri.

- Hetta er soleiðis ikki ein búni, sum menn eru í, tá teir fara út til sløkkiliðsuppgávur, men ein búni, teir eru í, tá teir umboða Skálafjarðar Sløkkilið í øðrum sambandi, leggur hann aftrat.

Sunleiv Højgaard sigur, at eingin kvinna hevur verið knýtt at sløkkiliðnum á Skálafirði, men onkur roynd hevur verið gjørt at fáa kvinnur upp í liðið.

- Eg veit, at onkur kvinna hevur verið við á øðrum sløkkiliðum, og eg veit eisini, at tað bara er ein spurningur um tíð, nær vit hava tær fyrstu kvinnurnar við á okkara liði, sigur hann.

### Góð veitsla

Sløkkiliðsleiðarin sigur, at teir høvdu eina góða veitslu á Sjókaféini, har eini 100 fólk tilsamans vóru við.

- Umframt sløkkiliðið, høvdu vit eisini bjóðað sløkkiliðsfólki úr grannabygdum við, borgarstjórum í teimum trimum kommununum, sum varða av Skálafjarðar Sløkkiliði, umboðum fyri brunanevndir, Brunaumsjón Landsins og umboðum fyri Alarmsentralin.

Sunleif Højgaard sigur, at Skálafjarðar Sløkkilið hevur ein trivnaðarbólk við trimum limum, og tað var hesin, sum í høvuðsheitum fyriskipaði veitsluna.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Leygardagurin byrjaði á Brandstøðini í Runavík við kaffi, rundstykkjum og wienarbreyði*



*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Føroyar halda minningardag teirra sjólátnu

## Fimm mans eru deyðir á sjónum farna árið, og í dag verða minningarhald kring landið

Vilmund Jacobsen

Dagurin í dag, 1. november, er minningardagur teirra sjólátnu.

Kring landið verða minningarhald við minnisvarðar og í kirkjum, og í morgun var minningarhald á Vinnuháskúlanum í Havn.

Tað var Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, sum beyð vælkomin á Vinnuháskúlanum, løgmaður, Kaj Leo Johannesen og presturin, Derhard Jógvansson, hildu talu.

Tríggir sálmar vórðu sungnir, "Lov og tøkk eg tær fram beri", "Mær halda Harrans hendur" og "Tak róðrið, Harri, ver mær hjá".

Av Vinnuháskúlanum varð farið niðan í Viðarlundina, har sálmurin "So tak tá mínar hendur" varð sungin, løgmaður legði krans við minnisvarðan, og síðan hevði prestur bøn og lýsti signing.

Minningarhaldið endaði við, at sálmurin "Stýr míni skútu" varð sungin.

Minningarhald teirra sjólátnu hevur eisini verið í Klaksvík í dag klokkan í dag.

Á skránni var eitt nú kórsangur við 17 Sangarum, felagssangur og Magnus Brahe Jørgensen, prestur, helt røðu.

### Fimm sjólátnir

Fimm mans eru farnir á sjónum síðsta árið. Teir eru:

Hilbert Martin Blástein, Viðareiði, doyði umborð á Polarhavi 12/11-09, 29 ára gamal.

Hans Jørgen Dam, Sandavági, doyði umborð á donskum farmaskipi við Florida 20/11-09, 68 ára gamal.

Martin Sofus Johannesen, ættaður úr Klaksvík, druknaði við Bursatanga 15/5-2010, 52 ára gamal.

Heini Olsen Klasvík, Klaksvík, funnin hin 26. mai 2010 á Hagaleiti, 40 ára gamal.

Finn Jacobsen, Vágur, hvarv av bingjuskipinum Taasinge Maersk í juli 2010, 53 ára gamal.

*vilmund@sosialurin.fo*

